# El-Service á Skála fingið nýggjar skipasáttmálar

**Stjórin á El-Service, John Eli Olsen, ásannar, at rættiliga lítið el-arbeiði hevur verið at gjørt her heima í longri tíð, og tí hevur verið neyðugt at siga nøkrum fólkum úr starvi. Men nú felagið hevur fingið nýggjar sáttmálar við donsku skipasmiðjuna, verður aftur brúk fyri meira fólki, og teir fyrstu eru longu byrjaðir aftur**



*P/F El-Service á Skála hevur samstarvað við Kartensens Værft í Skagen um fleiri enn tríati skip. John Eli Olsen er stjóri í el-fyritøkuni á Skála*

NÝGGIR SÁTTMÁLAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F El-Service á Skála hevur gjørt sáttmálar um el-talvur og el-instalatiónir til trý nýggj skip, sum Cartensens Værft í Skagen byggir og fer at byggja í næstum.

Hetta eru pelagisk skip, sum skulu byggjast til reiðaríir í ávikavist Írlandi, Finlandi og Danmark. Tað størsta av hesum skipum, er tað, sum danir lata byggja. Hetta er av sama slagi sum Finnur Fríði, sum gøtumenn eiga. Skrokkarnir verða bygdir í Póllandi, og restin av arbeiðnum verður so gjørt á skipasmiðjuni í Skagen.

## Byrja hálvan apríl

John Eli Olsen, stjóri hjá El-Service, sigur, at tveir av nevndu sáttmálum eru upp á skip, sum verða skift út við skip, ið El-Service áður hevur gjørt el-talvur og innstallatiónir til.

Síðan fyrst í nítiárunum hevur felagið á Skála samstarvað við Cartensens Værft í Skagen, og tilsamans hevur El-Service havt sáttmálar um fleiri enn tríati skip við donsku skipasmiðjuna.

– Vit hava teknað, projekterað, bygt høvuðstalvur og hava leverað og installerað alla el-útgerðina til hesi skipini, sigur hann.

Stjórin sigur, at sambært sáttmálunum við skipasmiðjuna, byrjar arbeiðið hjá El-Service í Danmark so hvørt, sum skrokkarnir eru komnir úr Póllandi.

– Alt fyrireikingararbeiði við tekningum, projektering og talvum verður gjørt á Skála, og síðan verður farið til Skagens, har uppseting og instalatiónsarbeiðið verður gjørt.

John Eli sigur, at teir fyrstu menninir fara niður til Skagens um hálvan apríl, tá ið byrjað verður upp á skrokkin, sum írlendingar skulu hava.

– Hesin er komin úr Póllandi og verður nú gjørdur liðugur á donsku skipasmiðjuni.

## Aftur til arbeiðis

Stjórin á El-Service ásannar, at rættiliga lítið el-arbeiði hevur verið at gjørt her heima í longri tíð, og tí hevur verið neyðugt at siga nøkrum fólkum úr starvi.

– Men nú vit hava fingið nýggju sáttmálarnar við donsku skipasmiðjuna, verður aftur brúk fyri meira fólki, og teir fyrstu eru longu byrjaðir aftur.

John Eli Olsen fýlist á, at føroyskar el-fyritøkur ikki sleppa upp í part, tá ið stórarbeiði verða gjørd í Føroyum, og í hesum sambandi vísir hann eitt nú á bygging av undirsjóvartunlum, sjúkrahús og nú eisini nýggja bygningin hjá Føroya Tele í Hoyvík, har El-Service bert hevði ein lutfalsliga lítlan leiklut.

Tað eru útlendskar fyritøkur, sum hava staðið fyri hesum uppgávum.

– Í fleiri førum fáa vit slett ikki høvið at bjóða, sigur John Eli, sum heldur tað vera undarligt, at El-Service skal kunna fáa stór arbeiðir í Danmark í kapping við aðrar stórar fyritøkur, men ikki í Føroyum.

# Útlendskar fyritøkur fáa tey stóru el-arbeiðini

**– Eg haldi, at okkum vantar rætta hugburðin í Føroyum, um vit skulu gerast betur til at gera tað, vit fáast við. Neyðugt er, at vit hugsa langsiktað – og ikki bara hugsa um, hvat tænir okkum best beint nú, sigur John Eli Olsen, stjóri á P/F El-Service á Skála**

HANDVERK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

John Eli Olsen sigur, at tá ið stórarbeiði verða gjørd í Føroyum, er tað oftast soleiðis, at tað eru útlendskar fyritøkur, sum fara avstað við el-arbeiðnum, hóast vit hava fleiri dygdargóðar el-fyritøkur í landinum. Hann sigur, at hetta ikki minst er galdandi, tá ið ræður um stórar verkætlanir, har tað almenna er uppi í.

Stjórin á El-Service á Skála nevnir soleiðis bygging av undirsjóvartunlum, nýggja sjúkrahúsið og nú eisini nýggja bygningin hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Hann ivast ikki í, at tað verða útlendingar, sum eisini fara avstað við el-arbeiðnum í sambandi við undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfirði.

– Í flestu førum er tað soleiðis, at vit sleppa slett ikki uppí part at bjóða upp á slík arbeiði.

## »Spyr politikararnar«

John Eli sigur, at El-Service hevur havt ein lítlan leiklut í samband við nýggja bygningin hjá Føroya Tele, men hetta hevur einki við høvuðsarbeiði at gera, sum útlendingar tóku sær av.

– Tað vísir seg, at útlendingar hava ein fyrimun fram um okkum við at konkurera í Føroyum.

Spurdur, hví so er, er svarið hjá honum stutt og greitt: Spyr politikararnar!

– Tað verður slongt út, at føroyskar fyritøkur ikki eru kappingarførar, men hetta er ikki allur sannleikin, minni enn so.

John Eli heldur tað vera undarligt, at føroyskar fyritøkur ikki skulu megna at kappast um arbeiðir í Føroyum – við útlendskar fyritøkur, tá ið somu fyritøkur kunnu vinna í kapping við útlendskar fyritøkur, eitt nú í Danmark.

– Her er okkurt, sum ikki hongur saman, leggur hann aftrat.

Stjórin á El-Service vísir á, at tað var tann tíð, tá ið útlendskar fyritøkur kundu kappast við føroyskar fyritøkur í Føroyum – uttan at noyðast at ganga undir somu treytir sum føroysku fyritøkurnar.

– Eitt nú kundu el-fyritøkur taka arbeiðir á seg í Føroyum uttan autorisatión, men hetta gongur ikki longur, sigur hann.

John Eli vísir á, at sjálvandi eru tær stóru útlendsku fyritøkurnar sterkar, sum kanska hava eini túsund fólk í arbeiði og kunnu keypa inn í rættiliga stórum nøgdum.

– Men heldur ikki her liggur allur sannleikin um viðurskiftini, tá ið ræður um slík arbeiðir í Føroyum.

## Hugburðurin skeivur

Stjórin á El-Service heldur, at eitt sum eisini haltar í Føroyum, er hugburðurin.

– Í Íslandi og Noregi er tað soleiðis, at útlendskar fyritøkur slett ikki koma í »betragtning«, um tær ikki í minsta lagi liggja eini 15% lægri í tilboði í mun til eina ávikavist íslendska ella norska fyritøku. Í Føroyum og Danmark verður bert hugt at, hvør hevur bíligasta tilboði – og so einki meira.

Men, sigur John Eli:

– Hetta ger samstundis, at vit í Føroyum hava lutfalsliga smáar møguleikar at gera okkum betri – og størri, tá ið hetta er hugburðurin í Føroyum.

Hann heldur tað enn einaferð verða løgið, at ein fyritøka sum El-Service kann kappast við danskar fyritøkur í Danmark, men ikki við danskar fyritøkur í Føroyum.

– Eg haldi avgjørt, at hugburðurin er fullkomiliga skeivur, og skulu vit í Føroyum røkka longur, enn vit gera í dag, noyðast vit at hugsa øðrvísi og ikki minst hugsa um, hvat tænir okkum best í longdini – og ikki bert í løtuni, sigur John Eli Olsen, stjóri á El-Service á Skála.